# Heimskend stjørna á Summarfestival

**Tað verður ongin minni enn heimskendi Brian McFadden, sum verður høvuðsnavnið á Summarfestivalinum í Klaksvík í ár. Mc Fadden bleiv heimskendur sum sangari í bólkinum Westlife, og liggur í løtuni ovast á hitlistunum í Europa við solo-fløguni "Irish Son"**

SUMMARFESTIVAL
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ambitiónunum hjá fyrireikarunum av Summarfestivalinum feila onki og við væleydnaða festivalinum í fjør í rygginum, setti teir sær skjótt fyri at stíla uppaftur hægri í ár. Í morgun kundi nevndin so avdúka, at tað verður ongin minni enn heimskenda írska poppstjørnan, Brian McFadden, sum verður høvuðsnavnið á Summarfestivalinum, sum verður í Klaksvík í døgunum 5. til 7. august.

### Írskur ævintýrari

Í høvuðsheitum verður Summarfestivalin í ár skipað eftir sama leisti sum í fjør, har byrjað verður fríggjakvøld og hildið á til sunnudag. Men longu nú er greitt, at Brian McFadden kemur et eiga stóra partin av fríggjakvøldinum, eftir at ein ella tveir bólkar hava hitað upp. Mcfadden kemur nevniliga við egnum bólki, og væntandi varir konsertin út við 1½ tíma.

At tað er eydnast at fáa eina so aktuella og kenda poppstjørnu sum McFadden hendanvegin er sambært fyrireikarnum úrlitið av góðum samráðingum við agentar, sum hava ein fingur á pulsinum og ikki minst kunnu borga fyri góðsku. Í hesum sambandinum hevur væleydnaða festivalin og stóru nøvnini frá í fjør avgjørt verið eitt gott kort at hava í hondini, tá farið varð undir at keypa eitt so stórt navn hendanvegin í ár. Uttan iva hevur tað eisini talt við, at ungi írin tykist at vera ein ævintýrari, sum fegin vil sleppa at uppliva eitt fjarskotið land, sum Føroyar Og kanska hava felags føroyskírsku røturnar eisini gjørt sítt til, siga fyrireikarnir.




*Gunnar Nolsø, Steintór Rasmussen og Eyðun Klakkstein eru ikki sørt ernir av at kunna bjóða eitt navn sum Brian McFadden fram á Summarfestivalinum í ár*

– Hetta hevur verið eitt puslispæl, og vit hava verið sera hepnir. Mcfadden fer nevniliga við rúkandi fer upp eftir hitlistunum í Europa í løtuni, so um nøkur ár ber tað bara til at droyma um at fatur á honum, sigur Steintór Rasmussen, samskipari

### Fjølbroyttur leygardagur

Enn er bert høvuðsnavnið á Summarfestivalinum avdúkað, men fyrireikarnir kunnu longu nú lova, at leygardagurin eisini í ár verður ein spennandi samanseting av føroyskum og útlendskum tónleikarum og bólkum á stóra pallinum, eins og í fjør. Harafturat kemur pallur 2 aftur í ár at hýsa eini røð av áhugaverdum tónleikarum, so fólk kunnu ganga ímillum og annars hugna sær á stóra festivaløkinum.

Leygardagurin á festivalunum var sera væleydnaður í fjør og tí hava fyrireikarnir ikki viljað broytt hendan partin av tiltakinum stórvegis í ár. Tónleikaliga kann dagurin tí væntast at verða líka fjølbroyttur, har okkurt verður fyri flestu aldursbólkar.

Forsølan til Summarfestivalin 2005 er byrjað, og fram til 1. juni hava fólk høvi at ogna sær sera bílig atgongumerki. Annars ber til at frætta meir um Summarfestivalin á heimasíðuni www.summarfestivalur.fo




# Tú kanst – bara tú fært møguleikan

**Hetta verður heitið á fundarrøð, sum Javn, nú fer undir kring alt landið**

FUNDARRØÐ
*Jákup Mørk*

Komandi vikurnar fer Javni at skipa fyri økisfundum kring landið. Hetta verður gjørt á tann hátt, at tær fimm økisnevndinar, sum eru í felagsskapinum, skipa fyri fundum á hvørjum øki sær, men í øllum fimm førunum verður evnið hitt sama.

– Endamálið við fundunum er, at vit vilja vísa á møguleikarnar, sum tey menningartarnaðu hava. Og ikki minst, hvørjar tey ikki hava í dagsins føroyska samfelag, sigur Malena Arnholdsdóttir, forkvinna í Javna.

– Hetta eru møguleikar, sum bæði tey menningartarnaðu og avvarandi vildu ynskt vóru til. Tí ynskja vit eisini, at tey, sum hava møguleika at hjálpa okkum í hesum, eisini verða við á fundunum. Tað verið seg lærarar, starvsfólk á stovnum, ergo- og fysioterapetur við meira, sigur hon.

Fundarrøðin verður skipað á tann hátt, at talan fyrst er um fyrilestur, og at tað eftirfylgjandi verður lagt upp til kjak um evnini, sum verða viðgjørd.

**Fundarrøðin**

| | |
|---|---|
| 2. mars | Vágar |
| 3. mars | Eysturoy |
| 5. mars | Suðuroy |
| 7. mars | Tórshavn |
| 15. mars | Klaksvík |